# UPPSKOT TIL PLANETIR

Besta útgáva
– send pla bu NR
1 A Place to Stand On – Deja Vu
2 Førist – Páll Finnur Páll
3 Koma – Petur Pólson
4 Morning Dew – Høgni Lisberg
5 Viva La Republica – 200

Besti føroyski
(bólkur/einstaklingur)
– send pla bf NR
1 200
2 Go Go Blues
3 Lama Sea
4 Makrel
5 Marius

Besti sangari
– send pla bs NR
1 Brandur Karlson Jacobsen
2 Janus Rasmussen
3 Kári Sverrisson
4 Kim Hansen
5 Teitur Lassen

Besta songkvinna
– send pla bk NR
1 Eivør Pállsdóttir
2 Guðrið Hansen
3 Guðrun Sólja Jacobsen
4 Lena
5 Petsi Tvørfoss

Besti nýggi
(bólkur/einstaklingur)
– send pla bn NR
1 Lama Sea
2 Marius
3 Petur Pólson
4 Poppkorn
5 The Dreams

Besti útlendski
(bólkur/einstaklingur)
– send pla ub NR
1 Green Day
2 James Blunt
3 Madonna
4 Nephew
5 Tim Christensen

Nú er greitt hvørjir bólkar og einstaklingar eru í uppskoti til planetirnar, ið Planet.fo og Sosialurin fara at lata síðst í hesum mánaðanum

**PLANET.FO**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Nú er klárt at atkvøða um planetirnar, ið verða handaðar á stóra galla kvøldinum á Hotel Føroyum 28. januar. Serliga dómsnevndin hevur funnið fimm uppskot til hvørja av teimum seks planetunum, ið tit kunnu atkvøða um á sms, frá nú og fram til 26. januar á miðnátt.

Í dómsnevndini sita fimm serkønir dómarar, ið umboða ymisk umhvørvi og leiklutir innan føroyskan tónleik. Her eru tónleikarar, sangarar, ummælarar, tónleikafyriskiparar og serfrøðingar, ið øll hava eitt felags eyðkenni, at øll hava ein brennandi áhuga og stórt forvitni, tá tað snýr seg um føroyskan tónleik.

Tey, ið eru í nevndini, eru Niels Uni Dam, Urd Johannesen, Sólarn Solmunde, Malan Eyðunsdóttir og Heri Ellingsgaard.

Til ber at atkvøða einaferð innan hvørja kategori fyri hvørja fartelefon, og øll fartelefonhald hjá Føroya Tele kunnu luttaka í atkvøðugreiðsluni. Hvør atkvøða kostar 5 kr. Sms atkvøðurnar telja helmingin av endaliga úrslitinum.

Limirnir í dómsnevndini atkvøða somuleiðis hvør í sínum lagi, og teirra samlaðu atkvøður telja hin helmingin av úrslitinum.

Síðani verða atkvøðurnar hjá fólki og dómsnevndini taldar saman til eitt endaligt úrslit, sum verður almannakunngjørt á stórfingna Planet tiltakinum á Hotel Føroyum.

Harafturat verður eisini ein serlig Planet-heiðursløn latin einum persóni, sum hevur avrikað nakað serligt í føroyskum tónleiki gjøgnum árini. Atkvøtt verður tó ikki um serligu Planet-heiðursløninina. Dómsnevndin tekur sjálv avgerð um hvør hevur uppiborið hendan heiður.

Ætlar tú at atkvøða fyri t.d. Morning Dew sum bestu útgávu, sendir tú ”pla bu 4” til 1441, ella fyri Lama Sea sum besta føroyska, sendir tú ”pla bf 3”




*200 hava við Viva La Republica og Muscleman-blað, lagt Føroyar fyri sínar føtu.*

## Atgongumerki til Planet-Galla

**Atgongumerki til Planet-Galla veitsluna verða at fáa í komandi viku, lýst verður nærri um hvussu og hvar. Nógv verður gjørt burtur úr tiltakinum, og nógvur góður tónleikur verður at hoyra. Á planet.fo ber komandi vikurnar til at fylgja við í hvør fer at spæla og hvat verður á skránni.**



*Janus Rasmussen og hinir í Lama Sea fingu sítt veruliga gjøgnumbrot í Prix Føroyum*

# LAMA SEA KUNNU VINNA TRÍGGJAR PLANETIR

Nógvir av royndastu tónleikarunum eru umboðaðir í listanum yvir uppskot til planet heiðurslønir, men tað er ein rættiliga nýggjur bólkur, ið er í uppskotið til flestar virðislønir

**PLANET.FO**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Lama Sea eru í uppskoti til tríggjar av teimum seks planetunum. Bólkurin er í uppskoti til Besta føroyska og Besta nýggja, meðan sangarin Janus Rasmussen er í uppskoti til Besta sangara. Eftir sum Lama Sea ikki hevur eina útgávu, ikki hevur eina songkvinnu og heldur ikki er ein útlendskur bólkur, so er bólkurin í veruleikanum í uppskoti til allar tær virðislønirnar, ið bólkurin kann vera í uppskoti til. Hetta er sera flott.

Tríggir bólkar eru í uppskoti til tvær planetir: 200 fyri bestu útgávu og besta bólk, Petur Pólsson fyri bestu útgávu og besta nýggja og GBOB vinnarin Marius fyri besta nýggja og besta bólk.

At trý av nýggju nøvnunum eru umboðaði í øðrum í uppskotunum til aðrar virðislønir, er sera jaligt, og skal síggjast, sum tekin um, at føroyskt tónleikalív er livandi og í góðari menning. Hendan virðislønin Besti nýggji verður latin til ein einstakling ella bólk, ið hevur fingið sítt veruliga gjøgnumbrot í árinum 2005.